## Íløguspæl 2008

Í fjør var veruligur fepur í Føroyum kring íløguspølini, ið Kaupthing banki og Eik lýstu við. Kaupthing er ikki virkin í Føroyum longur, tí er sjálvsagt at einki íløguspæl verður frá teimum í ár. Men hinvegin er Børsens Aktiespil virkið, eins og í fjør. Eik skipaði í fjør fyri eini serstakari kapping, einans fyri føroyingar, men einki útspæl hevur verið í ár, hóast spælið er farið av bakkastokki. Spælið byrjaði í gjár klokkan 10, men enn er møguligt at tekna seg. Heili 47.000 ymiskir brúkarar eru við. Spælið er ókeypis og at finna á www.aktiespil.borsen.dk. Í ár er høvuðsvinningurin ein Volvo V50, virði á 550.000 kr.



# Jóannes Eidesgaard tryggur í formanssessinum

**Tingmanningin og floksleiðslan í Javnaðarflokkinum var saman í gjárkvøldið, og tá var eittans evni á skránni: gjøgnumgongd av samgonguskjalinum. Fyrrapartin fer flokkurin at finna tey trý landsstýrisfólkini.**

LANDSSSTÝRISFÓLK
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Á floksleiðslufundinum hjá Javnaðarflokkinum í gjárkvøldið var samgonguskjalið millum ABC flokkarnar til viðgerðar, og sum Sosialurin skilur, var hetta sera væl móttikið. Semja var um, at her vóru sera mong sosialdemokratisk fingramerki á, so leiðslan og tingmanningin fingu sera jaliga móttøku á fundinum fyri innihaldinum í samgonguskjalinum.

Sosialurin skilur, at málið um, hvør skal vera landsstýrisfólk var ikki til viðgerðar. Tað fer at verða tikið upp á fundi fyrrapartin. Men eftir øllum at døma eru tað fleiri, sum bjóða seg fram. Tað ljóðar, at flokkurin ynskir at velja landsstýrisfólkini millum verandi tingmanning. Um tað so verður neyðugt at fara út um tingmanningina at leita eftir einum fíggjarmálaráðharra stendur so opið skilst.

Men fyribils hava hesi nøvn verið nevnd í sambandi við landsstýrissessirnar: Helena Dam á Neystabø, Hans Pauli Strøm, John Johannessen, Eyðgunn Samuelsen og Axel Johannessen.

Tað skilst annars, at Jóannes Eidesgaard helst fer at taka seg aftur til at vera tingmaður og vera meira virkin sum formaður í flokkinum. Gitingar um formansstríð í flokkinum, skilur Sosialurin, vórðu jarðaðar á fundinum. Formaðurin í flokkinum er og fer framhaldandi at vera Jóannes Eidesgaard.




## Vísindavøka í Føroyum

Fríggjakvøldið 26. september klokkan 19.30 verður Vísindavøka fyri fyrstu ferð hildin í Føroyum. Vísindavøkan verður á Náttúrugripasavninum á Debesartrøð í Havn.

**Skráin fyri Vísindavøkuna er hendan:**

Maria Skaalum Petersen:
**Parkinssons sjúka og umhvørvið**
*Maria Skaalum Petersen er Ph.D. lesandi við Syddansk Universitet.*

Dánjal Jákup Jacobsen:
**Granskingargrundað virksemi í fyritøkuni**
*Dánjal Jákup Jacobsen er Ph.D. í sivilverkfrøði og stjóri í fyritøkuni Decision3.*

Eyðun Andreassen:
**Fólkslig mentan sum granskingarevni**
*Eyðun Andreassen er dr. phil. og professari á Fróðskaparsetri Føroya.*

Eisini verður tilfar at fáa um ES-gransking.

Tiltakið er fyri alla familjuna. Tey størru hava høvi at lurta eftir áhugaverdum og fjølbroyttum framløgum um gransking, meðan tey smærru kunnu síggja og royna frálíku framsýningarnar um fuglar, fiskar, blómur og annað, sum eru gjørdar klárar til árliga Heystfagnaðin í oktober.




Vísindavøkan er partur av tiltakinum Researchers' Night, sum verður hildin í býum um alt Europa samstundis. Endamálið við hesum tiltaki er at økja um áhugan í samfelagnum fyri gransking.

Les meira um Vísindavøkuna á **gransking.fo**

Vit hittast á Náttúrugripasavninum á Debesartrøð í Havn **fríggjakvøldið 26. september klokkan 19.30.**

granskingarráðið
THE FAROESE RESEARCH COUNCIL

Granskingarráðið · Bryggjubakki 12 · Postrúm 259 · FO-110 Tórshavn
Tel 567800 · Faks 306901 · www.gransking.fo · gransking@gransking.fo


# Konsert á Reinsarínum fríggjakvøldið

**Konsert verður fríggjakvøldið kl 20 á spælistaðnum Reinsarínum í Havn. Bendar Spónir, Oniontree, 3st og Trygvi og Rasmus spæla**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Bendar Spónir eru fimm ungir dreingir, sum elska at jamma. Spæla droymandi prog-sýru-rock, íblást mest av 60-70´ara bólkum, og annars gerandisdegnum. Halda til á loftinum í MargarinFabrikkini. Hetta verður helst síðsta konsert í Føroyum, áðrenn bólkurin fer avstað á konsertferð til India.

"Bólkurin Bendar Spónir er áhugaverdur og verður spennandi at fylgja framyvir. Unglingar, ið eiga framtíðina, og tað ljóðar veruliga, sum her er nakað at koma eftir, tí hesir spældu droymandi rocktónleik, har eisini ljómborðs og aðrar hátøknisfinessir fingu rúm, uttan tó at doyva sjálvt spælið. til tíðir var hetta mest sum eitt bland millum the Doors og Pink Floyd. Mest droymandi og vælljóðandi, men so kom eisini swing og ferð á viðhvørt." (planet.fo)

Oniontree eru 3 dreingir. Nýta bass, trummur, gittar, sang. Inspireraðir av m.a. Angels and Airways og Rise Against. Hetta er fyrsta almenna konsert teirra. Ikki tí teir ikki hava spælt nógv, men alt hevur verið til føðingardagar og tílíkt.

3st er ein bólkur mannaður av 4 tónleikarum. Teir spæla harðan pop, ið er ringur at seta í bás. Teir hava verið til í nøkur ár, men hava skift manning fyri uml. ½ ári síðani. Sangarin, bassleikarin og gittarleikarin eru úr Kollafirði, og trummuspælarin er ein ektaður reyðhardur havnamaður.

Havnamenninir Trygvi og Rasmus eru ávíkavist 17 og 15 ár, og spæla teir saman í bólkinum Sixty-eight. Fríggjakvøldið vera teir tó at hoyra bert við tveimum akustiskum gittarum og teirra náttúrgivnu røddum, tá teir fara at framføra løg, sum teir sjálvir hava yrkt og sett lag til. Væntast kann ein intim, kensluborin og til tíðir flipput framførsla frá ungu gørpunum".

Bólkarnir kunnu kannast nærri á www.myspace.com/bendarsponir.com www.myspace.com/oniontree.com www.myspace.com/3st.com